

Rebekka Glasser Herlofsen gerst nevndarlimur í Statoil.

# Frá aling til oljufelag

**Jógvan Hugo Gardar**

15.03.2015 - 21:55

Oljan.fo

Fyrrverandi nevndarforkvinnan í norska alifelagnum Cermaq, gerst nú nevndarlimur í Statoil. Cermaq er selt til Japan og Mitsubishi, og Rebekka Glasser Herlofsen er farin frá sum forkvinna í tí sum var størsta íløgan hjá norska statinum í alivinnuni.

Nú eru boð eftir Herlufsen til ein nýggjan nevndarsess, í størstu norsku fyritøkuni Statoil.

Norsk lóg krevur at meir javnbýtt er millum kynini í norskum nevndum. Grace Reksten Skaugen hevur sitið í Statoil-nevndini síðani 2002, og hevur sjálv yngst at sleppa úr nevndini. Herlufsen er í uppskoti til at fáa hennara sess.

Rebekka Herlofsen hevur síðani 2012 verið fíggjarstjóri í reiðarínum Torvald Klaveness. Hon hevur millum annað eisini sitið í nevndini fyri DNV GL.